Kunngerðablaðið A

2011 Hefti 47

ISSN 0907-905X

Nr. 157 15. desember 2011

**Kunngerð**
**um**
**gjald fyri uppihald á Psykiatriska depli**

Við heimild í § 5, stk. 6 í løgtingslóg nr. 64 frá 17. mai 2005 um sjúkrahúsverkið, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 141 frá 11. oktober 2011, verður ásett:

**§ 1.** Persónar, sum hava uppihald á Psykiatriska depli, hóast teir eru liðugt viðgjørdir, skulu, um teir fáa pensjón, gjalda fyri uppihaldið.
*Stk. 2.* Uppihald sbrt. stk. 1 umfatar, umframt húsaleigu, allar útreiðslur til felags húsarhald og felags kostarhald.
*Stk. 3.* Uppihald sbrt. stk. 1 umfatar ikki útreiðslur til persónligan tørv og til privata nýtslu, íroknað útreiðslur til heilivág.

**§ 2.** Gjald fyri uppihald sbrt. § 1 er 5.500 kr. um mánaðin.
*Stk. 2.* Goldið verður frá og við fyrsta heila mánað eftir, at viðgerðin er endað, tó í fyrsta lagi frá og við januar 2012, til og við seinasta heila mánað, áðrenn uppihaldið endar.

**§ 3.** Landssjúkrahúsið krevur inn og umsitur gjald fyri uppihald sbrt. § 1.
*Stk. 2.* Gjald fyri uppihald skal krevjast inn mánaðarliga.

**§ 4.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2012.

Heilsumálaráðið, 15. desember 2011

**Karsten Hansen (sign.)**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen (sign.)

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

### § 1

Í løgtinglóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 139 frá 6. oktober 2011, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 2 verður orðað soleiðis:
„**§ 2.** Almannaveitingar sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a., løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl. og løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl. verða árliga javnaðar við 0% sambært §§ 5-6. Tó verður grundupphæddin til fólkapensjón ikki javnað.“

2) § 3 verður orðað soleiðis:
„**§ 3.** Pensjónsupphæddirnar, upphæddirnar fyri vanligt og serligt barnagjald, upphæddirnar til uppihaldshjálp, umframt frádráttarupphæddirnar o.a. í teimum í § 2 nevndu lógum eru:

1) Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.:

| | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Grunndupphædd til fólkapensjón – støk | 2012 | 50.028,00 |
| Grundupphædd til fólkapensjón – gift hvør | 2012 | 39.756,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 70.548,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – gift hvør | 2012 | 56.064,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 2012 | 38.268,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – gift hvør | 2012 | 29.616,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 70.128,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 2012 | 63.312,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 22.764,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – gift hvør | 2012 | 19.776,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 2012 | 21.492,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – gift hvør | 2012 | 17.256,00 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 2012 | 33.228,00 |
| Hjálparviðbót | 2012 | 35.196,00 |
| Røktarviðbót | 2012 | 70.248,00 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 2012 | 32.916,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fólkapensjónistar | 2012 | 60.400,00 |
| Frádráttarfrí inntøkuupphædd fyri fyritíðarpensjónistar | 2012 | 90.600,00 |

2) Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. árliga |
|---|---|---|
| Upphædd | 2012 | 7.416,00 |

3) Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.:

| | Byrjunarár | Kr. |
|---|---|---|
| Barnagjald sbrt. § 5 | 2012 | 12.672,00 (árliga) |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 2012 | 732,13 (eingangsupphædd) |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 2012 | 1.252,76 (mánaðarliga) |
| Barnagjald sbrt. § 15, stk. 1 og 2 | 2012 | 12.672,00 (árliga) |
| Økt barnagjald sbrt. § 15, stk. 3 | 2012 | 25.344,00 (árliga) |
| Barnaískoyti sbrt. § 19a | 2012 | 1.605,00 (um ársfj.) |

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og hevur virknað frá útgjalding av veitingum fyri januar mánað 2012.

*Stk. 2.* Samstundis, sum henda lóg kemur í gildi, verður § 1, nr. 1 í løgtingslóg nr. 139 frá 6. oktober 2011 um broyting í áseting og javning av almannveitingum strikað.

Tórshavn, 16. desember 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 95/2011

Nr. 159 16. desember 2011

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a.**

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 142 frá 6. oktober 2011 um broyting í løgtingslóg um almannapensjónir o.a. verður í § 2 „2012" broytt til: „2013".

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Tórshavn, 16. desember 2011

**Kaj Leo Holm Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 97/2011

Nr. 160 16. desember 2011

**Kunngerð**
**um**
**áseting og javning av almannaveitingum**

Við heimild í § 6 í løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 158 frá 16. desember 2011, § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 111 frá 20. desember 2002 um eldrarøkt í Sandoynni, § 32, stk. 1 og 4 og § 32 e, stk. 3 í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 26. mai 2011 og § 29, stk. 4 í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007, verður ásett:

**§ 1.** Upphæddirnar fyri 2012 eru:

Løgtingslóg um almannapensjónir o.a.

| | Kr. árliga |
|---|---|
| Grundupphædd til fólkapensjón – støk | 50.028,00 |
| Grundupphædd til fólkapensjón - gift hvør | 39.756,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón – støk | 70.548,00 |
| Grundupphædd til fyritíðarpensjón - gift hvør | 56.064,00 |
| Viðbót til fólkapensjón – støk | 38.268,00 |
| Viðbót til fólkapensjón - gift hvør | 29.616,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón – støk | 70.128,00 |
| Viðbót til hægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 63.312,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón – støk | 22.764,00 |
| Viðbót til miðal fyritíðarpensjón - gift hvør | 19.776,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón – støk | 21.492,00 |
| Viðbót til lægstu fyritíðarpensjón - gift hvør | 17.256,00 |
| Eyka viðbót til lægstu fyritíðarpensjónistar | 33.228,00 |
| Hjálparviðbót | 35.196,00 |
| Røktarviðbót | 70.248,00 |
| Avlamisviðbót/avlamisveiting | 32.916,00 |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd fyri fólkapensjónistar | 60.400,00 |
| Frádráttarfrí inntøkupphædd fyri fyritíðarpensjónistar | 90.600,00 |

Løgtingslóg um viðbót til ávísar pensjónistar v.fl.

| | Kr. árliga |
|---|---|
| Upphædd | 7.416,00 |

Løgtingslóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v.fl.

| | Kr. |
|---|---|
| Barnagjald eftir § 5 | 12.672,00 (árliga) |
| Gjald í sambandi við føðing eftir § 6, stk. 1 | 732,13 (eingangsupphædd) |
| Gjald til uppihald tveir mánaðir áðrenn og ein mánað aftaná føðing eftir § 6, stk. 1 | 1.252,76 (mánaðarliga) |
| Barnagjald eftir § 15, stk. 1 og 2 | 12.672,00 (árliga) |
| Økt barnagjald eftir § 15, stk. 3 | 25.344,00 (árliga) |
| Barnaískoyti sbrt. § 19a | 1.605,00 (um ársfj.) |

Løgtingslóg um eldrarøkt í Sandoynni og lógarkunngerð um lóg fyri Føroyar um almenna forsorg - gjald fyri uppihald á eldrasambýli og ellis- og røktarheimi

| | Kr. |
|---|---|
| Gjald fyri umlætting | 130,16 (um samdøgrið) |
| Gjald fyri vistarhald á eldrasambýli og ellis- og røktarheimi | 3.594,00 (mánaðarliga) |

Lógarkunngerð um lóg fyri Føroyar um almenna forsorg - egingjald fyri serlig bútilboð fyri heimleys

| | Kr. |
|---|---|
| Serlig bútilboð fyri heimleys § 11, stk. 2 | 1.794,00 (mánaðarliga) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.195,00 (mánaðarliga) |
| Serlig bútilboð fyri heimleys § 11, stk. 3 | 2.143,00 (mánaðarliga) |
| Eyka fyri kost í mesta lagi | 1.195,00 (mánaðarliga) |

Løgtingslóg um barnavernd

| | Kr. |
|---|---|
| Samsýning pr. barn | 117,05 (um samdøgrið) |
| Vistarhald v.m. til børn undir 10 ár - pr. barn, tá upp til 2 børn eru í somu fosturfamilju | 154,14 (um samdøgrið) |
| Vistarhald v.m. til børn 10 ár og eldri - pr. barn, tá upp til 2 børn eru í somu fosturfamilju | 162,25 (um samdøgrið) |
| Vistarhald v.m. tá fleiri enn 2 børn eru í somu fosturfamilju | 143,71 (um samdøgrið) |
| Lummapengar til børn 3-10 ár | 23,18 (um vikuna) |
| Lummapengar til børn 11-13 ár | 54,47 (um vikuna) |
| Lummapengar til børn 14-15 ár | 111,26 (um vikuna) |
| Lummapengar til børn 16 ár og eldri | 221,36 (um vikuna) |
| Til stovnan og útbúnað | 8.096,38 (eingangsupphædd) |

Lógarkunngerð um lóg fyri Føroyar um almenna forsorg - tænastugjald fyri búfólk á eldrasambýli ella ellis- og røktarheimi

| Inntøka: | Gjald um mánaðin: |
|---|---|
| 0 - 49.999 kr. | 2.000,00 kr. |
| 50.000 - 54.999 kr. | 3.072,50 kr. |
| 55.000 - 59.999 kr. | 3.162,50 kr. |
| 60.000 - 64.999 kr. | 3.260,00 kr. |
| 65.000 - 69.999 kr. | 3.335,00 kr. |
| 70.000 - 74.999 kr. | 3.432,50 kr. |
| 75.000 - 79.999 kr. | 3.522,50 kr. |
| 80.000 - 84.999 kr. | 3.605,00 kr. |
| 85.000 - 89.999 kr. | 3.702,50 kr. |
| 90.000 - 94.999 kr. | 3.792,50 kr. |
| 95.000 - 99.999 kr. | 3.875,00 kr. |
| 100.000 - 104.999 kr. | 3.972,50 kr. |
| 105.000 - 109.999 kr. | 4.062,50 kr. |
| 110.000 - 114.999 kr. | 4.145,00 kr. |
| 115.000 - 119.999 kr. | 4.235,00 kr. |
| 120.000 - 124.999 kr. | 4.325,00 kr. |
| 125.000 - 129.999 kr. | 4.415,00 kr. |
| 130.000 - 134.999 kr. | 4.505,00 kr. |
| 135.000 - 139.999 kr. | 4.602,50 kr. |
| 140.000 - 144.999 kr. | 4.677,50 kr. |
| 145.000 - 149.999 kr. | 4.767,50 kr. |
| 150.000 - 154.999 kr. | 4.856,00 kr. |
| 155.000 - 159.999 kr. | 4.947,50 kr. |
| 160.000 - 164.999 kr. | 5.045,00 kr. |
| 165.000 - 169.999 kr. | 5.135,00 kr. |
| 170.000 - 174.999 kr. | 5.225,00 kr. |
| 175.000 - 179.999 kr. | 5.307,50 kr. |
| 180.000 - 184.999 kr. | 5.397,50 kr. |
| 185.000 - 189.999 kr. | 5.495,00 kr. |
| 190.000 - 194.999 kr. | 5.585,00 kr. |
| 195.000 - 199.999 kr. | 5.667,50 kr. |
| 200.000 - 204.999 kr. | 5.757,50 kr. |
| 205.000 - 209.999 kr. | 5.855,00 kr. |
| 210.000 - 214.999 kr. | 5.937,50 kr. |
| 215.000 - 219.999 kr. | 6.027,50 kr. |

| | |
|---|---|
| 220.000 - 224.999 kr. | 6.117,50 kr. |
| 225.000 - 229.999 kr. | 6.207,50 kr. |
| 230.000 - 234.999 kr. | 6.297,50 kr. |
| 235.000 - 239.999 kr. | 6.387,50 kr. |
| 240.000 - 244.999 kr. | 6.477,50 kr. |
| 245.000 - 249.999 kr. | 6.560,00 kr. |
| 250.000 - 254.999 kr. | 6.665,00 kr. |
| 255.000 - 259.999 kr. | 6.740,00 kr. |
| 260.000 kr. ella meira | 6.830,00 kr. |

**§ 2.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og hevur virknað frá og við útgjalding av veitingum fyri januar mánaða 2012.

*Stk. 2.* Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 113 frá 13. desember 2010 um áseting og javning av almannaveitingum.

Almannamálaráðið, 16. desember 2011

**Annika Olsen (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen (sign.)

FØROYAPRENT · Svanamerktur prentlutur 541 705